**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)

# Úttøkuskipan til EM 2024 í Beograd

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi úttøkuskipan til EvropaMeistarastevnuna í svimjing 2024, sum verður í Beograd í Serbia frá 17. til 23. juni 2024.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 750 AQUA (2024) stig á langgeil (50m).

Sí AQUA 2024 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Female-.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-LCM_2024_Male-.pdf

Dømi: Pál Joensen hevur svomið besta føroyska avrik yvirhøvur, sum var 14:46.33 í 1500 frí á langgeil á HM í Shanghai í 2011, sum tá gav 960 AQUA stig meðan talvurnar nú siga 949 AQUA stig.

Vit kunnu í mesta lagi melda fýra (4) svimjarar av sama kyni til hvørja grein, og verða fýra (4) teir skjótastu tí valdir ífall at fleiri enn fýra (4) klára kravtíðina til somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2024, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Úttøka av juniorum koma upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 23. juli 2023 (HM 2023), til og við 12. mai 2024 (FML/JML 2024)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða SSF um teir svimjarar sum í kravtíðarskeiðnum hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS